# Loyvisreglugerð

# 2026

*Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum*

**Innihaldsyvirlit**

**Formæli**


Grein 1. Inngangur 5
Grein 2. Endamál 5

**1. Kapittul - Loyvisveitari**

Grein 3. Loyvisveitari 6
Grein 4. Loyvisumsitingin 6
Grein 5. Loyvisnevndir 8
Grein 6. Agamál 10
Grein 7. Loyvismannagongd 10
Grein 8. Serligar metingarmannagongdir fyri fíggjarviðurskifti 10
Grein 9. Eins viðferð og trúnaður 10

**2. Kapittul – Loyvisumsøkjari og luttøkuloyvi**

Grein 10. Allýsing av loyvisumsøkjara 11
Grein 11. Almennar skyldur hjá loyvisumsøkjarum / loyvishavum 11
Grein 12. Luttøkuloyvi 11

**3. Kapittul – Loyvistreytir fyri luttøku í Meistaradeildini og 1. Deild hjá monnum**

Grein 13. Alment 13

*Ítróttarligar treytir*

Grein 14. Ungdómsmenningarætlan 13
Grein 15. Ungdómslið 14
Grein 16. Virksemi innan kvinnufótbólt 15
Grein 17. Heilsukanning av leikarum 15

*Treytir um burðardygd á sosial- og umhvørvisøkinum*

Grein 18. Ætlan fyri burðardygd á sosial- og umhvørvisøkinum 15
Grein 19. Verju og umsorgan av børnum og ungum 15

*Treytir til vallarumstøður*

Grein 20. Vallar- og venjingarumstøður 16

*Treytir til starvsfólk og umsiting*


| | | |
|---|---|---|
| Grein 21. | Skrivstova | 16 |
| Grein 22. | Samskipari | 16 |
| Grein 23. | Fíggjarleiðari | 16 |
| Grein 24. | Lækni | 17 |
| Grein 25. | Fysioterapeutur | 17 |
| Grein 26. | Heilsupersónur til ungdómslið | 17 |
| Grein 27. | Trygdarleiðari | 18 |
| Grein 28. | Trygdarfólk | 18 |
| Grein 29. | Samskipari fyri viðhaldsfólk | 18 |
| Grein 30. | Høvuðsvenjari | 18 |
| Grein 31. | Hjálparvenjari | 19 |
| Grein 32. | Høvuðsungdómsvenjari | 19 |
| Grein 33. | Ungdómsvenjarar | 20 |
| Grein 34. | Starvsfólkabroytingar í loyvisárinum | 21 |


*Løgfrøðiligar treytir*


| | | |
|---|---|---|
| Grein 35. | Løgfrøðilig váttan | 21 |
| Grein 36. | Minstukrøv til løgfrøðiligar upplýsingar | 21 |
| Grein 37. | Viðtøkur og løgfrøðiliga bindandi undirskriftir | 22 |
| Grein 38. | Løgfrøðiligur bygnaður | 22 |


*Fíggjarligar treytir*


| | | |
|---|---|---|
| Grein 39. | Ársroknskapur | 23 |
| Grein 40. | Almannakunngerð av fíggjarligum upplýsingum | 23 |
| Grein 41. | Ongin gjaldkomin skuld til fótbóltsfeløg | 24 |
| Grein 42. | Ongin gjaldkomin skuld til starvsfólk | 25 |
| Grein 43. | Ongin gjaldkomin skuld til sosialar- og skattamyndugleikar | 26 |
| Grein 44. | Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina | 26 |


**4. Kapittul – Aðrar treytir og gildiskoma**


| | | |
|---|---|---|
| Grein 45. | Fylgiskjøl | 28 |
| Grein 46. | Eftirlitsvitjan og grannskoðan | 28 |
| Grein 47. | Agamál | 28 |
| Grein 48. | Gildiskoma | 28 |
| Fylgiskjal I. | Áseting av grannskoðara og metingarmannagongd grannskoðaranna | 29 |
| Fylgiskjal II. | Minstukrøv til roknskaparupplýsingar | 31 |
| Fylgiskjal III. | Støðið undir ársroknskapinum | 34 |

| | | |
|---|---|---|
| Fylgiskjal IV. | Fatan av gjaldkomnari skuld | 35 |
| Fylgiskjal V. | Metingarmannagongd loyvisveitarans | 36 |
| Fylgiskjal VI. | Loyvismannagongd | 41 |
| Fylgiskjal VII. | Tíðarætlan fyri loyvismannagongd | 46 |

**Formæli**

Henda reglugerðin er sett í gildi av Starvsnevndini, við heimild í grein 37 í viðtøkunum hjá Fótbóltssamband Føroya.

**Grein 1 – Inngangur**

1. Reglugerðin er galdandi fyri limafeløg í Fótbóltssamband Føroya, ið ítróttarliga hava vunnið sær rætt at luttaka í fylgjandi deildum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um:

    a) Meistaradeildin hjá monnum, og/ella
    b) 1. Deild hjá monnum.

2. Loyvisárið í hesi reglugerð er árið, sum loyvisumsøkjari hevur søkt um / fingið tillutað luttøkuloyvi til í føroysku landskappingini. Loyvisárið byrjar dagin eftir evstamark hjá Kærunevndini í loyvismálum at taka endaliga avgerð um veitan av luttøkuloyvi til loyvisumsøkjarar, og er galdandi til sama evstamark árið eftir.

    Tey luttøkuloyvi sum loyvisveitarin veitir loyvisumsøkjarum fara sjálvvirkandi úr gildi við endan á tí loyvisári, sum luttøkuloyvið varð veitt til.

3. Fótbóltssamband Føroya er *loyvisveitari* sambært hesi reglugerð.

4. Limafelag í Fótbóltssamband Føroya, ið søkir um luttøkuloyvi, verður í reglugerðini nevnt *loyvisumsøkjari*.

5. Limafelag í Fótbóltssamband Føroya, ið hevur fingið tillutað luttøkuloyvi, verður í reglugerðini nevnt *loyvishavi*.

6. Reglugerðin ásetur rættindi, skyldur og ábyrgd hjá øllum pørtum í loyvisskipanini hjá loyvisveitaranum, herundir um:

    a) tær mannagongdir sum loyvisveitarin skal fylgja í samband við viðgerð av umsóknum um luttøkuloyvi frá loyvisumsøkjarum;

    b) tær treytir sum loyvisumsøkjari skal lúka, ið viðvíkja ítróttarligum viðurskiftum, vallarumstøðum, starvsfólki og umsiting, løgfrøðilig viðurskifti og fíggjarlig viðurskifti; og

    c) tær treytir sum loyvishavi skal lúka í loyvisárinum, sum luttøkuloyvið er veitt til.

**Grein 2 – Endamál**

Endamálið við reglugerðini er:

a) at virka fyri og áhaldandi at menna støðið í øllum viðurskiftum, sum hava við føroyskan fótbólt at gera og at tryggja at serligur dentur verður lagdur á venjing og trivnað hjá ungum fótbóltsleikarum;
b) at tryggja, at limafeløg í Fótbóltssamband Føroya hava eina nøktandi leiðslu og bygnað;
c) at tryggja, at limafeløg í Fótbóltssamband Føroya hava hóskandi og tryggar vallarumstøður til leikarar, venjarar, dómarar, áskoðarar o.o.
d) at betra um fíggjarliga førleikan hjá feløgum, og økja um fíggjarliga gjøgnumskygnið og trúvirði;
e) at tryggja, at hóskandi dentur verður lagdur á at verja áognarar við at tryggja, at feløgini til ásettu tíð halda sínar fíggjarligu skyldur mótvegis sínum starvsfólkum, herundir leikarum og venjarum, sosialum- og skattamyndugleikum og øðrum feløgum.

# 1. kapittul – Loyvisveitari

### Grein 3 – Loyvisveitari

1. Loyvisveitari sambært hesi reglugerð er Fótbóltssamband Føroya.

2. Loyvisveitarin hevur í høvuðsheitum fylgjandi skyldur:

   a) at tryggja at ein hóskandi loyvisumsiting verður sett;
   b) at ein loyvisnevnd verður sett;
   c) at ein kærunevnd í loyvismálum verður sett;
   d) at mannagongdir verða staðfestar fyri viðgerð av loyvisumsóknum;
   e) at meta um innlatnar upplýsingar frá loyvisumsøkjarum / loyvishavum, til tess at staðfesta um loyvisumsøkjarin / loyvishavin lýkur ásettu loyvistreytirnar;
   f) at tryggja eins viðferð av loyvisumsøkjarum / loyvishavum;
   g) at tryggja, at innlatnar upplýsingar frá loyvisumsøkjarum / loyvishavum verða hildnar í trúnaði; og
   h) at taka avgerð um luttøkuloyvi kann verða veitt.

### Grein 4 – Loyvisumsitingin

1. Loyvisveitarin skal seta ein loyvisstjóra at stjórna loyvisumsitingina hjá loyvisveitaranum.

2. Uppgávurnar hjá loyvisumsitingini eru m.a.:

   a) at leggja tilrættis, íverkseta og áhaldandi at menna loyvisskipanina hjá loyvisveitaranum;
   b) at veita umsitingarligan stuðul til loyvisnevndina og kærunevndina í loyvismálum;
   c) at vegleiða og at hava eftirlit við loyvisumsøkjarum / loyvishavum;

d) at áseta og kunngerða tíðarfreistirnar fyri at lata inn umsókn um luttøkuloyvi og fyri viðgerðina av hesum; og
e) at taka støðu til um mál sambært hesi reglugerð eiga at verða løgd fyri Aga- og etiskunevndina í Fótbóltssamband Føroya.

3. Í minsta lagi eitt starvsfólk í loyvisumsitingini ella sum er sett uttanhýsis skal hava royndir í fíggjarvirksemi og góðkenning sum skrásettur ella løggildur grannskoðari frá Skráseting Føroya, ella sum loyvisveitarin metir er skikkaður og hevur fleiri ára starvsroyndir innan fíggjarvirksemi.

4. Loyvisstjórin fær frágreiðingar frá niðanfyri nevndu ráðgevum sum hava skyldu til innan teirra øki, at:

   a) meta um loyvisumsøkjarar lúka ásettu loyvistreytirnar í hesari reglugerðini við støði í innsendu upplýsingunum frá loyvisumsøkjarunum ella frá eftirlitskanningum sum loyvisstjórin setir í verk;
   b) samskifta við loyvisumsøkjara ella loyvishava um upplýsingar sum vænta viðvíkjandi viðkomandi loyvistreyt;
   c) lata loyvisstjóranum eina frágreiðing fyri hvønn einstakan loyvisumsøkjara;
   d) lata loyvisstjóranum eina frágreiðing fyri hvønn einstakan loyvisumsøkjara sum kærir; og
   e) halda ásettu tíðarfreistirnar í loyvismannagongdini (**fylgiskjal VI og VII**).

   Tekniski stjórin í FSF er ráðgevi og veitir loyvisstjóranum eina frágreiðing um loyvistreytirnar eru hildnar innan fylgjandi loyvistreytir:

   Grein 14. Ungdómsmenningarætlan
   Grein 30. Høvuðsvenjari
   Grein 31. Hjálparvenjari
   Grein 32. Høvuðsungdómsvenjari
   Grein 33. Ungdómsvenjarar

   Leiðarin í Kappingar- og dómaradeildini í FSF er ráðgevi og veitir loyvisstjóranum eina frágreiðing um loyvistreytirnar eru hildnar innan fylgjandi loyvistreytir:

   Grein 15. Ungdómslið
   Grein 16. Virksemi innan kvinnufótbólt

   Leiðarin fyri Burðardygd á sosial- og umhvørvisøkinum í FSF ("SES Manager") er ráðgevi og veitir loyvisstjóranum eina frágreiðing um loyvistreytirnar eru hildnar innan fylgjandi loyvistreytir:

   Grein 18. Ætlan fyri burðardygd á sosial- og umhvørvisøkinum
   Grein 19. Verju og umsorgan av børnum og ungum

   Trygdarleiðarin í FSF er ráðgevi og veitir loyvisstjóranum eina frágreiðing um loyvistreytirnar eru hildnar innan fylgjandi loyvistreytir:

Grein 20. Vallar- og venjingarumstøður
Grein 27. Trygdarleiðari
Grein 28. Trygdarfólk
Grein 29. Samskipari fyri viðhaldsfólk

Fíggjarligi ráðgevin í FSF (ella uttanhýsis fíggjarligur ráðgevi) er ráðgevi og veitir loyvisstjóranum eina frágreiðing um loyvistreytirnar eru hildnar innan fylgjandi loyvistreytir:

Grein 39. Ársroknskapur
Grein 40. Almannakunngerð av fíggjarligum upplýsingum
Grein 41. Ongin gjaldkomin skuld til fótbóltsfeløg
Grein 42. Ongin gjaldkomin skuld til starvsfólk
Grein 43. Ongin gjaldkomin skuld til sosialar- og skattamyndugleikar
Grein 44. Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina

**Grein 5 - Loyvisnevndir**

1. Loyvisnevndirnar eru Loyvisnevndin (1. instansur) og Kærunevndin í loyvismálum (2. instansur), ið mugu vera óheftar hvør av aðrari.

*Loyvisnevndin*

2. Loyvisnevndin virkar sum 1. instansur og tekur avgerð um, hvørt eitt luttøkuloyvi skal veitast einum loyvisumsøkjara við støði í umsóknini, sum varð latin inn samsvarandi ásetingunum í hesari reglugerð, og um luttøkuloyvi skal takast aftur.

3. Í Loyvisnevndini sita formaður, varaformaður og 3 nevndarlimir. Í minsta lagi ein av nevndarlimunum skal vera løgfrøðingur og í minsta lagi ein av hinum nevndarlimunum skal vera góðkendur (skrásettur ella løggildur) grannskoðari hjá Skráseting Føroya.

4. Nevndarlimirnir verða valdir av Aðalfundinum hjá loyvisveitaranum og sita í tvey ár í senn. Nevndarlimir kunnu veljast aftur. Nevndarlimirnir kunnu ikki samstundis sita í aðrari nevnd hjá loyvisveitaranum. Nevndin skipar seg sjálv.

5. Starvsnevndin hjá loyvisveitaranum kann eftir tørvi tilnevna varalimir til nevndina, sum kunnu luttaka í nevndarviðgerðini um aðrir valdir nevndarlimir bera seg undan at luttaka í nevndarviðgerð vegna fráveru ella ógegni.

6. Loyvisnevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi 3 nevndarlimir eru hjástaddir. Um tað stendur á jøvnum, hevur formaðurin avgerandi atkvøðuna.

*Kærunevndin í loyvismálum*

7. Kærunevndin í loyvismálum virkar sum 2. instansur og tekur avgerð í kærumálum sett fram skrivliga viðvíkjandi avgerðum hjá Loyvisnevndini, og tekur eina endaliga avgerð (avgerðin kann ikki kærast til annan myndugleika sambært viðtøkunum hjá loyvisveitaranum) um luttøkuloyvi skal verða veitt ella tikið aftur.

8. Í Kærunevndini í loyvismálum sita formaður, varaformaður og 3 nevndarlimir. Í minsta lagi ein av nevndarlimunum skal vera løgfrøðingur og í minsta lagi ein av hinum nevndarlimunum skal vera góðkendur (skrásettur ella løggildur) grannskoðari hjá Skráseting Føroya.

9. Nevndarlimirnir verða valdir av Aðalfundinum hjá loyvisveitaranum og sita í tvey ár í senn. Nevndarlimir kunnu veljast aftur. Nevndarlimirnir kunnu ikki samstundis starvast í umsitingini hjá loyvisveitaranum ella sita í aðrari nevnd hjá loyvisveitaranum. Nevndin skipar seg sjálv.

10. Starvsnevndin hjá loyvisveitaranum kann eftir tørvi tilnevna varalimir til nevndina, sum kunnu luttaka í nevndarviðgerðini um aðrir valdir nevndarlimir bera seg undan at luttaka í nevndarviðgerð vegna fráveru ella ógegni.

11. Kærunevndin í loyvismálum er viðtøkufør, tá í minsta lagi 3 nevndarlimir eru hjástaddir. Um tað stendur á jøvnum, hevur formaðurin avgerandi atkvøðuna.

12. Avgerðir hjá Loyvisnevndini kunnu einans kærast av:

    a) loyvisumsøkjara, ið hevur fingið sýtt luttøkuloyvi av Loyvisnevndini;
    b) loyvishava, ið hevur fingið frátikið sítt luttøkuloyvi av Loyvisnevndini; ella
    c) loyvisstjóranum, ið virkar vegna loyvisveitaran.

13. Kærunevndin í loyvismálum tekur avgerð við støði í avgerðini hjá Loyvisnevndini og øðrum prógvum, sum kærarin hevur latið inn saman við kæruskrivinum og teimum upplýsingum sum koma fram á einum møguligum hoyringsfundi, innanfyri ásettu tíðarfreistirnar fyri kærumál.

*Krøv til nevndarlimir í Loyvisnevndini og Kærunevndini í loyvismálum*

14. Nevndarlimirnir í Loyvisnevndini og Kærunevndini í loyvismálum hava skyldu til, at:

    a) taka óheftar avgerðir;
    b) bera seg undan at atkvøða um nakað ivamál er viðvíkjandi óheftni mótvegis loyvisumsøkjaranum ella um mótstríðandi áhugamál eru; t.d. er óheftnið ikki tryggjað um nevndarlimur ella onkur nærstandandi hjá nevndarlimi (maki, børn, foreldur ella systkin) eru limur, partaeigari, handilspartnari, sponsorur ella ráðgevi hjá loyvisumsøkjaranum.
    c) ikki samstundis virka sum loyvisstjóri;
    d) ikki samstundis at vera partur av eini aðrari dømandi nevnd hjá loyvisveitaranum;

e) ikki samstundis at vera partur av Starvsnevndini hjá loyvisveitaranum; og
f) ikki samstundis at vera partur av leiðsluni í limafelagi hjá loyvisveitaranum.

*Mannagongdir og tíðarfreistir hjá loyvisnevndunum*

15. Loyvisnevndirnar hava skyldu til at virka í samsvar við teimum mannagongdum og tíðarfreistum, ið ásettar eru í **fylgiskjali VI** og **VII** til hesa reglugerð.

## Grein 6 – Agamál

Fyri at tryggja eina hóskandi metingarmannagongd eru aga- og etiskunevndarreglurnar hjá loyvisveitaranum galdandi fyri onnur brot á hesa reglugerð (t.d. at lata inn falsaðar upplýsingar, ikki at yvirhalda ásett evstamark, revsing mótvegis einstaklingum, o.s.fr.), tó undantikið brot á teimum loyvistreytum har loyvisnevndirnar einsamallar hava heimild at taka avgerð.

Aga- og etiskunevndarreglugerðin hjá loyvisveitaranum verður at nýta sum løgfrøðiligt grundarlag fyri revsiátøkum (møguligar revsingar eru ásettar í grein 55 í viðtøkunum hjá loyvisveitaranum).

## Grein 7 – Loyvismannagongd

1. Loyvismannagongdin er ásett í **fylgiskjali VI** og **VII** til hesa reglugerð, ið inniheldur tær mannagongdir og tíðarfreistir sum loyvisnevndirnar og loyvisumsitingin skulu fylgja fyri at meta um loyvisumsøkjarar lúka ásettu loyvistreytirnar í hesi reglugerð.

2. Loyvisumsøkjarar hava skyldu til at lata inn loyvisumsókn í samsvar við loyvismannagongdina, umframt aðrar upplýsingar sum loyvisstjórin ella ráðgevar hansara umbiðja innanfyri tíðarfreistirnar, ið ásettar eru í **fylgiskjali VII**.

## Grein 8 – Serligar metingarmannagongdir fyri fíggjarviðurskifti

Serligar metingarmannagongdir eru ásettar viðvíkjandi fíggjarviðurskifti, og skulu loyvistreytirnar um fíggjarviðurskifti verða mettar um samsvarandi mannagongdunum í **fylgiskjali V**.

## Grein 9 - Eins viðferð og trúnaður

1. Loyvisveitarin hevur skyldu at tryggja, at loyvisumsøkjarar fáa eins viðferð og verða viðgjørdir eftir somu treytum og mannagongdum.

2. Loyvisveitarin hevur skyldu at tryggja, at loyvisumsóknir og givnar upplýsingar í hesum sambandi verða viðgjørdar í trúnaði.

3. Áðrenn loyvisnevndarlimir, kærunevndarlimir í loyvismálum, starvsfólk í loyvisumsitingini og ráðgevar hjá loyvisstjóranum kunnu fara undir sítt virksemi, skulu hesir skriva undir skrivliga váttan um at halda upplýsingar í loyvisskipanini í trúnaði, ið eisini er galdandi eftir at hesir persónar ikki longur eru knýttir at loyvisskipanini.

## 2. kapittul – Loyvisumsøkjari og luttøkuloyvi

### Grein 10 – Allýsing av loyvisumsøkjara

1. Einans limafeløg hjá Fótbóltssamband Føroya kunnu vera loyvisumsøkjarar.

2. Fleiri limafeløg kunnu ikki søkja um luttøkuloyvi í felag.

### Grein 11 – Almennar skyldur hjá loyvisumsøkjarum / loyvishavum

1. Loyvisumsøkjarar hava skyldu til at lata loyvisveitaranum:

   a) allar neyðugar upplýsingar og/ella viðkomandi skjøl, ið til fulnar prógvar at loyvistreytirnar í hesi reglugerð eru loknar; og
   b) eitthvørt annað skjal ella upplýsing, ið er viðkomandi í samband við støðutakan hjá loyvisveitaranum.

2. Loyvisumsøkjarar / loyvishavar hava skyldu til at fráboða til loyvisveitaran allar týðandi broytingar í áður innsendum upplýsingum.

3. Tað er altíð loyvisumsøkjarin / loyvishavin til hvørja tíð, ið hevur próvbyrðuna at prógva, at treytirnar í hesi reglugerð eru loknar, og at givnu upplýsingarnar eru sannar.

### Grein 12 – Luttøkuloyvi

1. Limafeløg hjá loyvisveitaranum, ið eru nevnd undir grein 1(1), skulu søkja um og fáa tillutað luttøkuloyvi frá loyvisveitaranum sambært hesi reglugerð, áðrenn tey kunnu taka lut í landskappingini, sum søkt verður um luttøkuloyvi til.

2. Limafeløg hjá loyvisveitaranum, ið ítróttarliga hava vunnið sær rætt at luttaka í Meistaradeildini hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, skulu søkja um luttøkuloyvi til Meistaradeildina hjá monnum og lúka tær treytir, sum eru galdandi fyri Meistaradeildina hjá monnum í hesi reglugerð. Um felagið eisini ítróttarliga

hevur vunnið sær rætt at luttaka í 1. Deild hjá monnum, so skal felagið harumframt lúka treytirnar, ið eru galdandi fyri 1. Deild hjá monnum.

3. Limafeløg hjá loyvisveitaranum, ið ítróttarliga hava vunnið sær rætt at luttaka í 1. Deild hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, skulu søkja um luttøkuloyvi til 1. Deild hjá monnum og lúka tær treytir sum eru galdandi fyri 1. Deild hjá monnum í hesi reglugerð.

4. Limafeløg hjá loyvisveitaranum, ið flyta niður úr Meistaradeildini hjá monnum í 1. Deild við endan av undanfarna kappingarári, kunnu søkja um luttøkuloyvi sum tiltaksfelag til Meistaradeildina hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um.

   Luttøkuloyvi sum tiltaksfelag til Meistaradeildina hjá monnum kann einans verða veitt av loyvisnevndunum um loyvisumsøkjarin lýkur tær treytir sum eru galdandi fyri Meistaradeildina hjá monnum í hesi reglugerð.

   Veitt luttøkuloyvi sum tiltaksfelag til Meistaradeildina hjá monnum gevur einans rætt til luttøku í Meistaradeildini hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, um ein ella fleiri loyvisumsøkjarar, sum ítróttarliga hava vunnið sær rætt at luttaka í Meistaradeildini hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, fær/fáa sýtt luttøkuloyvi av loyvisnevndunum.

   Um fleiri loyvisumsøkjarar søkja um luttøkuloyvi sum tiltaksfelag til Meistaradeildina hjá monnum, so hevur tann loyvisumsøkjarin, sum endaði ovast á stigatalvuni (av niðurflytarunum) undanfarna kappingarár fyrsta rætt til luttøku í Meistaradeildini hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, treytað av at omanfyri nevndu treytir eru loknar.

   Um allir loyvisumsøkjarar, ið ítróttarliga hava vunnið sær rætt at luttaka í Meistaradeildini hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, søkja um og fáa játtað luttøkuloyvi av loyvisnevndunum, so fara veitt luttøkuloyvi *sum tiltaksfelag* til Meistaradeildina hjá monnum sjálvvirkandi úr gildi.

5. Tey luttøkuloyvi sum loyvisveitarin veitir loyvisumsøkjarum fara sjálvvirkandi úr gildi við endan á tí loyvisári, sum luttøkuloyvið varð veitt til.

6. Veitt luttøkuloyvi sambært hesi reglugerð kunnu ikki flytast millum feløg ella aðrar partar.

7. Veitt luttøkuloyvi sambært hesi reglugerð kann verða tikið aftur av loyvisnevndunum nevndar í grein 5 um:

   a) loyvishavin ikki longur lýkur treytirnar fyri givna luttøkuloyvinum; ella
   b) loyvishavin fremur týðandi brot á sínar skyldur sambært hesi reglugerð.

8. Loyvisumsøkjari, sum hevur fingið noktað luttøkuloyvi av Loyvisnevndini, ella loyvishavi sum hevur fingið frátikið veitt luttøkuloyvi av Loyvisnevndini, hava rætt at kæra hesa avgerð til Kærunevndina í loyvismálum.

# 3. kapittul - Loyvistreytir fyri luttøku í Meistaradeildini, og 1. Deild hjá monnum

### Grein 13 – Alment

*Treytir fyri veiting av luttøkuloyvi til* ***Meistaradeildina hjá monnum***

1. Loyvisumsøkjarar sum søkja um luttøkuloyvi til Meistaradeildina hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, skulu lúka loyvistreytirnar í hesum kapitli (kap. 3), áðrenn luttøkuloyvi kann verða veitt.

   Um loyvisumsøkjarin eisini ítróttarliga hevur vunnið sær rætt at luttaka í 1. Deild hjá monnum, so skal felagið harumframt lúka treytirnar, ið eru galdandi fyri 1. Deild hjá monnum.

*Treytir fyri veiting av luttøkuloyvi til* ***1. Deild hjá monnum***

2. Loyvisumsøkjarar sum søkja um luttøkuloyvi til 1. Deild hjá monnum í landskappingini í loyvisárinum sum søkt verður um, skulu lúka loyvistreytirnar í hesum kapitli (kap. 3), áðrenn luttøkuloyvi kann verða veitt, tó undantikið treytirnar í grein 16, 17, 18, 23, 24, 25, 26, 27, 28, 29, 31 og 36, ið ikki eru galdandi fyri 1. Deild hjá monnum.

## ÍTRÓTTARLIGAR TREYTIR

### Grein 14 – Ungdómsmenningarætlan
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava eina skrivliga FSF góðkenda ungdómsmenningarætlan.

2. FSF skal regluliga eftirkanna íverksetanini av tí góðkendu ungdómsmenningarætlanini og eftirmeta góðskuna á henni.

3. Ætlanin skal í minsta lagi innihalda fylgjandi viðurskifti:

   a. Endamál og filosofi innan ungdómsmenning.
   b. Skipan av ungdómsbygnaði (bygnaðaryvirlit, nevndir, tilknýti til loyvisumsøkjaran, ungdómslið o.s.fr.).
   c. Starvsfólk (teknisk, medisinsk, umsiting, o.s.fr.) og minstukrøv til hesi.
   d. Infrastrukturur (umstøður til venjing og dystir, atgongd, o.s.fr.).

e. Fíggjarligt tilfeingi (fíggjarætlan, stuðul frá loyvisumsøkjara, leikarum ella lokala umhvørvinum, o.s.fr.).
f. Fótbóltsútbúgving fyri ymsar aldursbólkar (leikaraeginleikar, teknisk, taktisk og fysisk).
g. Útbúgvingarátøk (Fótbóltslógin; anti-doping; integritet; anti- rasisma).
h. Heilsuhjálp til ungar leikarar (íroknað umsiting av heilsuupplýsingum).
i. Eftirmeting og mannagongd fyri viðmerkingum í sambandi við meting av úrslitum og avrikum mótvegis endamálunum.
j. Tíðarskeið fyri ætlanini (í minsta lagi trý ár men í mesta lagi 7 ár).

4. Loyvisumsøkjarin skal harafturat tryggja at:

   a. allir ungdómsleikarar sum eru partur av ungdómsmenningarætlanini kunnu fylgja kravdari skúlagongd í samsvar við føroyskari lóg; og
   b. eingin ungdómsleikari sum er partur av ungdómsmenningarætlanini verður forðaður í at halda áfram við aðra skúlagongd.

**Grein 15 – Ungdómslið**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

Loyvisumsøkjarin skal hava fylgjandi ungdómslið innanfyri sína løgfrøðiligu eind, aðrari løgfrøðiligari eind sum er partur av ársroknskapinum ella eitt fótbóltsfelag sum er atknýtt/dótturfelag til sína løgfrøðiligu eind:

*Galdandi fyri **Meistaradeildina hjá monnum**:*

a. Í minsta lagi 4 ungdómslið í aldursbólkinum 10 til 21 ár;
b. Í minsta lagi 1 undir 10 lið ella skipaðan fótbólt fyri undir 10 ár.

*Galdandi fyri **1. Deild hjá monnum:***

1 ungdómslið í trimum ungdómsaldursbólkum. Treytin er tó ikki galdandi fyri loyvisumsøkjarar, sum eru fluttir upp úr 2. Deild hjá monnum frá undanfarna kappingarári

1. Hvørt av hesum ungdómsliðum, undantikið undir 10 ár, skulu taka lut í almennu landskappingini, økis- ella lokalum kappingum, ið eru góðkendar av FSF.

**Grein 16. Virksemi innan kvinnufótbólt**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal stuðla kvinnufótbólti við at seta í verk átøk og virksemi við endamálinum framhaldandi at menna, at professionalisera og at fremja umdømið av kvinnufótbólti, so sum t.d. at:

    a. at melda eitt 1. lið og/ella ungdómslið til almennar kappingar;
    b. at veita stuðul til skipan av atknýttum felagi við kvinnufótbólti; ella
    c. at skipa fyri øðrum tiltøkum innan kvinnufótbólt.

**Grein 17. Heilsukanning av leikarum**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal seta í verk og nýta eina mannagongd sum tryggjar, at allir leikarar sum eru úttiknir til at leika fyri 1. liðið fara til eina árliga heilsukanning. Heilsukanningin skal fevna um somu kanningar sum kravdar eru fyri luttøku í UEFA kapping sambært *UEFA Medical Regulations*.

2. Loyvisumsøkjarin skal seta í verk og nýta eina mannagongd sum tryggjar at allir ungdómsleikarar yvir 12 ára aldur fara til eina árliga heilsukanning í trá við viðkomandi reglum hjá FSF.

## TREYTIR UM BURÐARDYGD Á SOSIAL- OG UMHVØRVISØKINUM

**Grein 18. Ætlan fyri burðardygd á sosial- og umhvørvisøkinum**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal seta í verk og nýta eina ætlan fyri burðardygd á sosial- og umhvørvisøkinum sum er í trá við *UEFA Football Sustainability Strategy 2030* og viðkomandi UEFA leiðreglur, í minsta lagi fyri økini javnrættindi og inkludering, anti-rasismu, verju og umsorgan av børnum og ungum, fótbóltur fyri øll, og verju av umhvørvinum.

**Grein 19. Verju og umsorgan av børnum og ungum**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal seta í verk og nýta eina mannagongd til verju og umsorgan av børnum og ungum og tryggja at hesi eru í einum tryggum umhvørvi tá tey taka lut í virksemi sum loyvisumsøkjarin skipar fyri.

## TREYTIR TIL VALLARUMSTØÐUR

**Grein 20 – Vallar- og venjingarumstøður**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava hóskandi vallarumstøður til venjing og landskappingina (heimavøllur og kringumstøður), ið eru góðkendar av loyvisveitaranum samsvarandi galdandi Vallarreglugerð FSF´s.

2. Um loyvisveitarin hevur veitt loyvisumsøkjara undantak frá ásettum reglum í Vallarreglugerð FSF´s, so er hetta at rokna sum, at loyvisumsøkjarin lýkur treytina til vallarumstøður.

## TREYTIR TIL STARVSFÓLK OG UMSITING

**Grein 21 – Skrivstova**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava eina hóskandi skrivstovu til sítt virksemi. Skrivstovan skal vera opin fyri almenninginum og hava fastar upplatingartíðir (í minsta lagi 4 tímar um vikuna í kappingarárinum, og 2 tímar um vikuna uttanfyri kappingarárið), og verða mannað av starvsfólki, sum hevur hóskandi innlit í umsitingarlig viðurskifti innan fótbólt.

2. Skrivstovan skal í minsta lagi verða útgjørd við telefon, telduposti og heimasíðu.

**Grein 22 – Samskipari**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein samskipara, sum hevur ábyrgdina av tí dagliga virkseminum í felagnum.

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum samskiparin skal virka, hvørjar uppgávur samskiparin skal røkja, og hvørja løn ella aðra samsýning samskiparin fær.

3. Samskiparin skal hava gott innlit í umsitingarlig viðurskifti innan fótbólt.

**Grein 23 - Fíggjarleiðari**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein fíggjarleiðara, sum hevur ábyrgdina av fíggjarmálum í felagnum.

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum fíggjarleiðarin skal virka, hvørjar uppgávur fíggjarleiðarin skal røkja, og hvørja løn ella aðra samsýning fíggjarleiðarin fær.

3. Fíggjarleiðarin skal í minsta lagi lúka fylgjandi førleikakrav:

   a) skrásettur sum løggildur grannskoðari hjá Skráseting Føroya; ella
   b) skrásettur sum skrásettur grannskoðari hjá Skráseting Føroya; ella
   c) verða mettur, at hava hóskandi førleikar grundað á royndir í minsta lagi í 3 ár í fíggjarmálum.

**Grein 24 - Lækni**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein lækna, sum hevur ábyrgdina av at veita heilsufakliga ráðgeving og viðgerð í felagnum.

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum læknin skal virka, hvørjar uppgávur læknin skal røkja, og hvørja løn ella aðra samsýning læknin fær.

3. Læknin skal verða skrásettur sum lækni hjá heilsumyndugleikunum.

**Grein 25 – Fysioterapeutur**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein fysioterapeut, sum hevur ábyrgdina av at veita viðgerð og vøddamýking undir venjing og dystum hjá 1. liðnum í felagnum.

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum fysioterapeuturin skal virka, hvørjar uppgávur fysioterapeuturin skal røkja, og hvørja løn ella aðra samsýning fysioterapeuturin fær.

3. Fysioterapeuturin skal verða skrásettur sum fysioterapeutur hjá heilsumyndugleikunum.

**Grein 26. Heilsupersónur til ungdómslið**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt í minsta lagi ein lækna ella fysioterapeut, sum er góðkendur av heilsumyndugleikunum, sum hevur ábyrgd fyri heilsuumsorgan av ungdómsliðunum.

**Grein 27 – Trygdarleiðari**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein trygdarleiðara, sum hevur ábyrgdina av trygdarviðurskiftum í felagnum.

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum trygdarleiðarin skal virka, hvørjar uppgávur trygdarleiðarin skal røkja, og hvørja løn ella aðra samsýning trygdarleiðarin fær.

3. Trygdarleiðarin skal í minsta lagi lúka fylgjandi førleikakrav:

   a) hava prógv sum løgreglumaður ella trygdarfólk; ella
   b) hava trygdarprógv frá loyvisveitaranum ella frá einum veitara, ið er viðurkendur av landinum; ella
   c) verða mettur, at hava hóskandi førleikar grundað á royndir í minsta lagi í 1 ár í leikvallartrygd.

**Grein 28 – Trygdarfólk**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt trygdarfólk, ið hava ábyrgdina av trygdarviðurskiftunum í samband við heimadystir hjá felagnum.

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum trygdarfólkini skulu virka, hvørjar uppgávur trygdarfólkini skulu røkja, og hvørja løn ella aðra samsýning trygdarfólkini fáa.

**Grein 29. Samskipari fyri viðhaldsfólk**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein samskipara fyri viðhaldsfólk, sum skal virka sum høvuðskontaktpersónur hjá viðhaldsfólki.

2. Samskiparin fyri viðhaldsfólk møtir regluliga og samstarvar við viðkomandi persónar í felagnum á viðkomandi økjum.

**Grein 30 – Høvuðsvenjari**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein høvuðsvenjara, sum hevur ábyrgdina av fylgjandi viðurskiftum:

   a) val av leikarum;
   b) taktikkur og venjing av liðnum;

   c) leiðsla av leikarum og tekniskum starvsfólkum í skiftingarrúmi og á tekniska økinum áðrenn, meðan og aftaná dystin; og
   d) skyldur í samband við fjølmiðlaviðurskifti (pressufundir, samrøður o.s.fr.).

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum høvuðsvenjarin skal virka, og hvørja løn ella aðra samsýning høvuðsvenjarin fær.

3. Høvuðsvenjarin skal í minsta lagi lúka fylgjandi førleikakrav:

   *Galdandi fyri **Meistaradeildina hjá monnum:***

   a) hava gildugt FSF A/UEFA A venjaraprógv; ella
   b) vera innskrivaður og byrjaður á FSF A/UEFA A venjaraútbúgvingini; ella
   c) hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF A/UEFA A venjaraprógv.

   *Galdandi fyri **1. Deild hjá monnum** (umframt fyri loyvisumsøkjari til Meistaradeildina hjá monnum, ið eisini hevur lið í 1. Deild hjá monnum sama ár):*

   a) hava gildugt FSF B/UEFA B venjaraprógv; ella
   b) vera innskrivaður og byrjaður á FSF B4/UEFA B venjaraútbúgvingini; ella
   c) hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B/UEFA B venjaraprógv.

**Grein 31 – Hjálparvenjari**
(Meistaradeildina hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein hjálparvenjara, sum hevur ábyrgdina av at verða høvuðsvenjaranum á 1. liðnum til hjálpar í samband við venjing og dyst.

2. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa undir hvørjum treytum hjálparvenjarin skal virka, hvørjar uppgávur hjálparvenjarin skal røkja, og hvørja løn ella aðra samsýning hjálparvenjarin fær.

3. Hjálparvenjarin skal í minsta lagi lúka fylgjandi førleikakrav:

   a) hava gildugt FSF B/UEFA B venjaraprógv; ella
   b) verða innskrivaður og byrjaður á FSF B4/UEFA B venjaraútbúgvingini; ella
   c) hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B/UEFA B venjaraprógv.

**Grein 32 – Høvuðsungdómsvenjari**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal hava útnevnt ein skikkaðan høvuðsungdómsvenjara sum hevur dagligu og teknisku ábyrgdini av ungdómsøkinum.

2. Høvuðsungdómsvenjarin skal í minsta lagi hava eina av fylgjandi venjaraútbúgvingum, frá einum fótbóltssambandi í UEFA í trá við *UEFA Coaching Convention*:

   a. gildugt FSF B/UEFA B venjaraprógv; ella
   b. vera innskrivaður og byrjaður á FSF B4/UEFA B venjaraútbúgvingini; ella
   c. hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B/UEFA B venjaraprógv.

3. Høvuðsungdómsvenjarin kann ikki samstundis verða høvuðsvenjari í Meistaradeildini hjá monnum.

**Grein 33 – Ungdómsvenjarar**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Fyri hvørt av teimum kravdu ungdómsliðunum skal loyvisumsøkjarin hava útnevnt í minsta lagi ein skikkaðan venjara sum hevur ábyrgd fyri øll fótbóltsviðurskifti viðvíkjandi tí liðnum.

2. Í minsta lagi tríggir høvuðsvenjarar hjá ungdómsliðum skulu allir hava í minsta lagi eina av fylgjandi venjaraútbúgvingum, frá einum fótbóltssambandi í UEFA í trá við *UEFA Coaching Convention*:

   a. gildugt FSF B/UEFA B venjaraprógv; ella
   b. vera innskrivaður og byrjaður á FSF B4/UEFA B venjaraútbúgvingini; ella
   c. hava annað gildugt venjaraprógv, ið er á samsvarandi støði sum FSF B/UEFA B venjaraprógv.

3. Aðrir høvuðsvenjarar fyri ungdómslið (1 venjari fyri hvønn árgang) skulu lúka fylgjandi minstukrøv til venjaraútbúgving:

   a. í aldursbólkunum U7dr+g, U9dr+g, U11dr+g, U13dr+g skulu hava gildugt FSF C/UEFA C venjaraprógv, ella vera innskrivaður og byrjaður uppá FSF C/UEFA C venjaraútbúgvingina.
   b. í aldursbólkunum U15dr, U17dr, U21dr og U16g skulu hava gildugt FSF B/UEFA B venjaraprógv, ella vera innskrivaður og byrjaður uppá FSF B4/UEFA B venjaraútbúgvingina.

4. Ein ungdómsvenjari kann í mesta lagi hava ábyrgdina fyri tveimum aldursbólkum.

**Grein 34 – Starvsfólkabroytingar í loyvisárinum**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Um ein útnevndur persónur, ið er nevndur undir grein 22 til 33 fer frá í einum loyvisári, so skal loyvishavin tryggja, at ein avloysari, ið lýkur førleikakrøvini, er útnevndur innanfyri 60 dagar.

2. Um serligar umstøður gera seg galdandi, so sum sjúka ella óhapp, so kann loyvisveitarin leingja freistina útum teir 60 dagarnar.

3. Loyvishavin hevur skyldu til beinanvegin at boða loyvisveitaranum frá tílíkum broytingum.

## LØGFRØÐILIGAR TREYTIR

**Grein 35 – Løgfrøðilig váttan**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal lata inn eina løgfrøðiliga váttan, ið váttar fylgjandi:

   a) at hann viðurkennir, sum løgfrøðiliga bindandi, viðtøkur, reglugerðir, rundskriv og avgerðir hjá Fótbóltssamband Føroya;
   b) at hann beinanvegin kunnar loyvisveitaran um allar týðandi broytingar, hendingar ella støður, ið kunnu hava stóran fíggjarligan týdning;
   c) at hann vil halda og fylgja galdandi *FSF loyvisreglugerð fyri Meistaradeildina og 1. Deild hjá monnum*;
   d) at øll innlatin skjøl eru fullfíggjað og røtt;
   e) at loyvisumsitingin og loyvisnevndirnar eru heimilað, at kanna øll viðkomandi skjøl og at fáa til vega upplýsingar frá øllum viðkomandi almennum myndugleikum ella privatum stovnum samsvarandi føroyskari lóg;
   f) at loyvisveitarin hevur rætt til at fremja eftirlit av loyvisumsøkjaranum / loyvishavanum, soleiðis sum ásett í grein 46;
   g) at loyvisveitarin hevur rætt til at almannakunngerða seinast grannskoðaða ársroknskapin hjá loyvisumsøkjaranum, umframt upplýsingar um samsýningar til fótbóltsagentar, soleiðis sum ásett í grein 40.

2. Teir nevndarlimir, sum løgfrøðiliga kunnu binda loyvisumsøkjaran, skulu skriva undir løgfrøðiligu váttanina.

**Grein 36. Minstukrøv til løgfrøðiligar upplýsingar**
(Meistaradeildin hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal í minsta lagi lata inn fylgjandi løgfrøðiligar upplýsingar um loyvisumsøkjaran og um ein annar, skrásetti limurin í FSF:

a. Fullfíggjað løgfrøðiligt navn;
b. Hvussu felagið er skipað løgfrøðiliga;
c. Avrit av galdandi, gildugum lógum felagsins (t.e. viðtøkurnar);
d. Útskrift frá almennari skráseting (t.e. Skráseting Føroya);
e. Yvirlit yvir persónar sum hava heimild at skriva undir vegna felagið; og
f. Slag av kravdari undirskrift (t.e. einstakur persónur ella fleiri í felag).

2. Loyvisumsøkjarin skal eisini lata inn fylgjandi kontaktupplýsingar:

    a. Adressa á høvuðssætinum;
    b. Almennar kontaktupplýsingar (so sum telefon/fax nummar og teldupostadressur);
    c. Adressa á almennu heimasíðuni; og
    d. Navn og beinleiðis kontaktupplýsingar hjá høvuðs kontaktpersóni viðvíkjandi loyvisviðurskifti.

**Grein 37 – Viðtøkur og løgfrøðiliga bindandi undirskriftir**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal lata inn avrit av teimum galdandi viðtøkunum hjá loyvisumsøkjaranum.

2. Loyvisumsøkjarin skal harumframt lata inn yvirlit við nøvnunum á teimum persónum, ið løgfrøðiliga hava heimild at binda loyvisumsøkjaran, herundir upplýsing um hvørjir persónar skulu skriva undir fyri at loyvisumsøkjarin formliga verður løgfrøðiliga bundin.

**Grein 38 – Løgfrøðiligur bygnaður**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal lata inn yvirlit yvir løgfrøðiligan bygnað við í minsta lagi fylgjandi upplýsingum:

    a) hvørjar nevndir loyvisumsøkjarin hevur;
    b) navn á nevndarlimum í ymsu nevndunum;
    c) um loyvisumsøkjarin hevur nakað atknýtt dótturfelag, og um so er, hvussu eigara- og atkvøðuviðurskiftini eru ímillum loyvisumsøkjaran og dótturfelagið; og
    d) um nakar triðjapartur hevur ognarlut, týðandi avgerðarrætt ella ávirkan á loyvisumsøkjaran.

## FÍGGJARLIGAR TREYTIR

### Grein 39 - Ársroknskapur
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal lata inn ársroknskap við endadegi innan tíðarfreistina fyri innlating av umsókn til loyvisveitara.

2. Ársroknskapurin skal grannskoðast av einum óheftum grannskoðara sum ásett í **fylgiskjali I**.

3. Ársroknskapurin skal í minsta lagi innihalda:

   a) fíggjarstøðu;
   b) rakstur; og
   c) notur, sum innihalda samandrátt av týðandi nýttum roknskaparhættum og aðrar frágreiðandi notur.

4. Ársroknskapurin skal lúka minstukrøvini fyri roknskaparupplýsingar sum ásett í **fylgiskjali II**, og nýttan roknskaparhátt, sum ásett í **fylgiskjali III**. Ársroknskapurin skal innihalda samanberingartøl fyri undanfarna tíðarskeið.

5. Eru minstukrøvini fyri innihaldi og nýttum roknskaparhátti, sum útgreinað í stykki 4 omanfyri, ikki lokin í ársroknskapinum, so skal loyvisumsøkjarin fyrireika eykaupplýsingar, fyri at lúka minstukrøvunum um upplýsingarskyldu. Eykaupplýsingar skulu eisini váttast av einum óheftum grannskoðara, sum útgreinað í **fylgiskjali I**.

### Grein 40 – Almannakunngerð av fíggjarligum upplýsingum
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. *Ársroknskapur:*
   Tann seinast grannskoðaði ársroknskapurin, sum loyvisumsøkjarin hevur latið inn í samband við treytina undir grein 39, verður almannakunngjørdur á heimasíðu FSF´s, tá endalig støða er tikin til veitan ella noktan av luttøkuloyvi.

2. *Upplýsingar um samsýningar til fótbóltsagentar:*
   Loyvisumsøkjarin skal lata inn yvirlit yvir teir fótbóltsagentar , sum loyvisumsøkjarin hevur nýtt í tíðarskeiðnum 1. januar – 31. desember undan árinum loyvi verður søkt til, í samband við keyps-, leigu-, og/ella flytingaravtalur av leikarum, og skal loyvisumsøkjarin upplýsa allar tær samsýningar, sum loyvisumsøkjarin hevur rindað til fótbóltsagentar í hesum sambandi.

   Tá endalig støða er tikin til veitan ella noktan av luttøkuloyvi, verða upplýsingar um samlaðu samsýningina, sum loyvisumsøkjarin hevur rindað til omanfyri nevndu fótbóltsagentar, almannakunngjørdar á heimasíðu FSF´s.

**Grein 41 – Ongin gjaldkomin skuld til fótbóltsfeløg**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal prógva, at hann tann 31. januar innan loyvisárið byrjar, ikki hevur gjaldkomna skuld (sum útgreinað í **fylgiskjali IV**) til onnur fótbóltsfeløg, sum stavar frá leikaraflytingum fram til 31. desember í undanfarna ári.

2. Við gjaldkomna skuld verður sipað til tær upphæddir, sum fótbóltsfeløg vegna leikaraflytingar, íroknað venjingar- og solidaritetsendurgjald sum útgreinað í FIFA Regulations on the Status and Transfer of Players, umframt einhvør skyldug upphædd, sum er treytað av at ávísar treytir eru lúkaðar.

3. Loyvisumsøkjarin skal gera og lata loyvisveitaranum eitt yvirlit yvir leikaraflytingar. Yvirlitið skal gerast, hóast eingin leikari er keyptur ella útlántur í tíðarskeiðnum.

4. Loyvisumsøkjarin skal upplýsa:

   a) allar nýggjar leikaraskrásetingar (íroknað lán) í 12 mánaðar tíðarskeiðnum undan 31. desember, uttan mun til, um nakað skyldugt gjald er 31. desember;
   b) allar flytingar, har ein upphædd er skyldug 31. desember, uttan mun til, um hon stavar frá 12 mánaðar tíðarskeiðnum undan 31. desember ella áðrenn; og
   c) allar flytingar, sum rættarliga eru lagdar fram fyri heimilaðan myndugleika í føroyskari lóg ella fyri einum øðrum rætti innanlands ella altjóða fótbóltsmyndugleikum ella viðkomandi gerðarrætti.

5. Yvirlitið yvir leikaraflytingar skal í minsta lagi innihalda hesar upplýsingar (fyri hvørja leikaraflyting sær, íroknað lán):

   a) leikari (eyðmerktur við navni ella nummari);
   b) dagfesting fyri flyting/lánsavtalu;
   c) navnið á fótbóltsfelagnum, sum hevði skrásetingina áðrenn flytingina;
   d) goldin ella skyldug upphædd fyri keyp ella lán av leikara (íroknað venjingar- og solidaritetsendurgjald), hóast gjald ikki er umbiðið av kreditorinum;
   e) aðrar beinleiðis útreiðslur fyri útvegan av skráseting av leikara, bæði goldið og/ella skyldugt;
   f) goldin upphædd og gjaldsdagfesting;
   g) skyldug upphædd 31. desember fyri hvørja leikaraflyting, umframt gjaldsfreist fyri hvørt ógoldið gjald;
   h) skuld tann 31. januar (framflutt frá 31. desember) íroknað gjaldkomudagur fyri hvørt gjaldið, sum enn ikki er goldið, saman við frágreiðing;
   i) treytaðar upphæddir (treytað skuld), sum ikki eru innroknaðar í fíggjarstøðuna tann 31. desember; og
   j) upphæddir viðvíkjandi rættarligum krøvum.

6. Loyvisumsøkjarin skal stemma samlaða skuld sambært yvirlitinum yvir leikaraflytingar av mótvegis talinum í fíggjarstøðuni í ársroknskapinum fyri “Skuld frá leikaraflyting” ella við undirliggjandi roknskaparupplýsingar.

7. Yvirlitið yvir leikaraflytingar skal góðkennast av leiðsluni og hetta skal prógvast við stuttari váttan og undirskrift frá nevndarformanninum / nevndarforkvinnuni.

**Grein 42 – Ongin gjaldkomin skuld til starvsfólk**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal prógva, at hann tann 31. januar innan loyvisárið byrjar, ikki hevur gjaldkomna skuld (sum útgreinað í **fylgiskjali IV**) til starvsfólk, sum stavar frá sáttmála ella lógarásettum bindingum fram til 31. desember í undanfarna ári.

2. Við gjaldkomna skuld verður sipað til tær samsýningar, sum felagið skyldar starvsfólki við støði í sáttmála ella lógarásettum bindingum, íroknað lønarsamsýningum, gjøldum fyri myndarættindi, bonus og aðrar veitingar. Skyldugar samsýningar til fólk, sum av ymsum orsøkum ikki starvast hjá loyvisumsøkjaranum longur, hoyra eisini til hendan bólk og skulu greiðast innan ásettu tíðarfreistina í sáttmálanum og/ella lýstir í lóg, uttan mun til, hvussu slíkar upphæddir eru bókaðar í ársroknskapinum.

3. Heitið “starvsfólk” umfatar hesar persónar:

    a) allir yrkisleikarar sambært galdandi *FIFA Regulations on the Status and Transfer of Players*; og
    b) starvsfólkini (útnevndir persónar) sum eru nevnd í grein 22 til og við grein 33.

4. Loyvisumsøkjarin skal gera og lata loyvisveitaranum eitt yvirlit yvir starvsfólk, ið vísir:

    a) øll starvsfólk, sum eru/hava verið í starvi í árinum fram til 31. desember, t.e. ikki bert tey, sum eru eftirverandi 31. desember;
    b) øll starvsfólk, sum loyvisumsøkjarin skyldar eina upphædd, sum er gjaldkomin 31. desember, uttan mun til um tey hava verið í starvi í árinum fram til 31. desember; og
    c) øll starvsfólk, ið hava krav, sum verður viðgjørt av skikkaðum myndugleika eftir føroyskari lóggávu og sakarmál, sum verður viðgjørt av ítróttarmyndugleika innan- ella uttanlands ella viðkomandi gerðarrætti.

5. Hesar upplýsingar skulu í minsta lagi vera við fyri hvørt einstakt starvsfólk:

    a) navn á starvsfólki;
    b) starv/uppgáva hjá starvsfólki;
    c) setanardagur;
    d) seinasti arbeiðsdagur (um nakar);
    e) skyldug upphædd 31. desember, umframt gjaldkomudagur fyri hvørt ógoldið gjald;
    f) øll skuld 31. januar (flutt fram frá 31. desember), við gjaldkomudegi fyri hvørt ógoldið gjald, saman við frágreiðing; og

g) upphæddir viðvíkjandi sakarmálum/rættarligum krøvum.

6. Loyvisumsøkjarin skal stemma samlaða skuld sambært yvirlitinum yvir skuld til starvsfólk av mótvegis talinum í ársroknskapinum fyri "skuld til starvsfólk" ella við undirliggjandi roknskaparupplýsingar.

7. Yvirlitið yvir starvsfólk skal góðkennast av leiðsluni og hetta skal prógvast við stuttari váttan og undirskrift frá nevndarformanninum / nevndarforkvinnuni.

**Grein 43 – Ongin gjaldkomin skuld til sosialar- og skattamyndugleikar**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal prógva, at hann tann 31. januar innan loyvisárið byrjar, ikki hevur gjaldkomna skuld (sum útgreinað í **fylgiskjali IV**) til sosialar- og skattamyndugleikar, sum stavar frá sáttmála ella lógarásettum bindingum fram til 31. desember í undanfarna ári.

2. Loyvisumsøkjarin skal gera og lata grannskoðaranum og loyvisveitaranum eitt yvirlit yvir skuld til sosialar- og skattamyndugleikar, ið vísir:

   a) skyldug upphædd (um nøkur) til skikkaðar sosialar- og skattamyndugleikar tann 31. desember í árinum fyri loyvisárinum; og
   b) eitthvørt sakarmál/rættarligt krav, ið er til viðgerðar.

3. Hesar upplýsingar skulu í minsta lagi vera við fyri hvørja skylduga upphædd til sosialar- og skattamyndugleikar, saman við frágreiðing:

   a) navn á kreditori;
   b) øll skuld tann 31. desember, umframt gjaldkomudagur fyri hvørt ógoldið gjald;
   c) øll skuld tann 31. januar (flutt fram frá 31. desember), við gjaldkomudegi fyri hvørt ógoldið gjald, saman við frágreiðing og stuðlandi prógvi; og
   d) upphæddir viðvíkjandi sakarmálum/rættarligum krøvum.

4. Loyvisumsøkjarin skal stemma samlaða skuld sambært yvirlitinum yvir skuld til sosialar- og skattamyndugleikar av mótvegis talinum í ársroknskapinum fyri "skuld til sosialar- og skattamyndugleikar" ella við undirliggjandi roknskaparupplýsingar.

5. Yvirlitið yvir sosialar- og skattamyndugleikar skal góðkennast av leiðsluni og hetta skal prógvast við stuttari váttan og undirskrift frá nevndarformanninum / nevndarforkvinnuni.

**Grein 44 – Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina**
(Meistaradeildin og 1. Deild hjá monnum)

1. Loyvisumsøkjarin skal gera og lata inn fíggjarligar upplýsingar um framtíðina fyri at prógva fyri loyvisveitaranum, at hann er førur fyri at halda fram við framhaldandi rakstri (going

concern) til endan á loyvisárinum, um hann hevur brotið nakran av indikatorunum í stykki 2 niðanfyri.

2. Um ein loyvisumsøkjari vísir nakra av støðunum, sum verða lýstar í indikatori 1 ella 2, so er tað at meta sum eitt brot á indikatorin:

   a) Indikatorur 1: *Framhaldandi rakstur*
   Grannskoðanarátekningin í ársroknskapinum, sum er latin inn í samsvari við grein 39, hevur ískoytisupplýsingar ella fyrivarni viðvíkjandi framhaldandi rakstri.

   b) Indikatorur 2: *Negativur eginpeningur*
   Ársroknskapurin (íroknað, har tað verður kravt, eykaupplýsingarnar), sum er latin inn í samsvari við grein 39, vísur eina netto skuld (negativan eginpening), sum er versnað í mun til samanberingartølini í ársroknskapinum frá undanfarna ári.

3. Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina skulu fevna um tað tíðarskeið, sum byrjar beint eftir seinasta kravda endadag í ársroknskapinum, og skulu fevna um alt loyvisárið.

4. Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina eru:

   a) ein fíggjarætlan fyri raksturin við samanberingstølum fyri undanfarna roknskaparár;
   b) ein fíggjarætlan fyri peningastreym við samanberingstølum fyri undanfarna roknskaparár;
   c) frágreiðandi notur við stuttari frágreiðing av hvørjum av teimum týðandi fyritreytunum (við tilvísing til viðkomandi part av søguligum fíggjarligum- og øðrum upplýsingum), sum hava verið nýttar til at fyrireika fíggjarætlanina fyri raksturin og peningastreymin, umframt høvuðsváðarnar, sum kunnu ávirka framtíðarúrslit.

5. Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina skulu í minsta lagi gerast fyri hvønn ársfjórðing.

6. Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina skulu gerast eftir sama leisti sum grannskoðaði ársroknskapurin og skal fylgja sama roknskaparhátti, sum er nýttur til ársroknskapin, undantikið broytingar í roknskaparhátti, sum eru framdar eftir endadegnum á nýggjasta ársroknskapi, sum skulu vera sjónligar í næsta ársroknskapi – og um so er, so skulu staklutirnir upplýsast.

7. Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina skulu lúka minstukrøvini til roknskaparupplýsingar sum útgreinað í Fylgiskjali II. Ískoyttar reglur og notur skulu leggjast afturat, um tær eru uppklárandi ella um fíggjarligu upplýsingarnar verða misvísandi, um tær ikki eru við.

8. Fíggjarligar upplýsingar um framtíðina við teimum fyritreytum tær eru grundaðar á, skulu góðkennast av leiðsluni og hetta skal prógvast við stuttari váttan og undirskrift frá nevndarlimi/nevndarlimum, sum løgfrøðiliga kunnu binda loyvisumsøkjaran.

## 4. kapittul – Aðrar treytir og gildiskoma

### Grein 45 – Fylgiskjøl

Øll fylgiskjøl til hesa reglugerð er partur av teimum treytum, sum loyvisumsøkjarar og/ella loyvishavarar skulu lúka.

### Grein 46 – Eftirlitsvitjan og grannskoðan

1. Loyvisumsitingin tilskilar sær rætt til nær tað skal vera, at fremja grannskoðan av og koma á eftirlitsvitjan hjá loyvisumsøkjaranum og/ella loyvishavanum.

2. Eftirlitsvitjan og/ella grannskoðan av loyvisumsøkjaranum og/ella loyvishavarum hevur sum endamál, at eftirkanna um loyvisumsøkjarar og/ella loyvishavar lúka teirra skyldur sambært hesi reglugerð.

### Grein 47 – Agamál

Eitthvørt brot á hesa reglugerð kann verða revsað av Aga- og etiskunevnd FSF´s, tó við undantaki av brotum á teimum loyvistreytum í kapittul 3, ið eru kravdar fyri at fáa luttøkuloyvi (sí grein 13 (1 - 2)). Í hesum førum hava loyvisnevndirnar í grein 5 avgerðarheimildina, og kunnu avgerðirnar hjá loyvisnevndunum ikki kærast til Aga- og etiskunevndina í FSF.

### Grein 48 – Gildiskoma

1. Hendan reglugerðin er samtykt av Starvsnevnd FSF´s tann 18. desember 2025.

2. Hendan reglugerðin kemur ístaðin fyri, og setir úr gildi *FSF Loyvisreglugerð 2025*, ið varð samtykt av Starvsnevnd FSF´s tann 25. desember 2024.

3. Hendan reglugerðin kemur í gildi beinanvegin eftir at hon er samtykt av Starvsnevnd FSF´s.

# Fylgiskjal I. Áseting av grannskoðara og metingarmannagongd grannskoðaranna

## A. Meginregla

1. Grannskoðarin skal vera óheftur í samsvari við International Federation of Accountants (IFAC) Code of Ethics for Professional Accountants.

2. Grannskoðarin skal vera limur í Felagnum Føroyskir Grannskoðarar ella vera skrásettur/løggildur grannskoðari sambært føroyskari lóggávu.

## B. Metingarmannagongd

1. Grannskoðarin skal grannskoða ársroknskapin. Grannskoðarátekningin skal:

    a) innihalda eina niðurstøðu, sum váttar, at grannskoðanin er gjørd í samsvari við International Standards on Auditing ella viðkomandi grannskoðanarhátti sambært føroyskari lóg ella siðvenju, har hesi samsvara við, sum minstamark, treytirnar hjá International Standards on Auditing; og

    b) latast loyvisveitaranum saman við ársroknskapinum, sum skal vera støði undir hansara avgerð um loyvisveitan.

2. Grannskoðarin skal meta um eykaupplýsingar, um tað eru nakrar. Grannskoðaraátekningin við sakligum úrslitum skal:

    a) innihalda eina niðurstøðu um, at metingin er gjørd í samsvari við avtalaðum arbeiðsgerðum í samsvari við International Standard on Related Services (ISRS) 4400 ella viðkomandi føroyskari lóg ella siðvenju, har hesi samsvara við, sum minstamark, treytirnar hjá ISRS 4400; og

    b) latast loyvisveitaranum saman við eykaupplýsingunum, sum skal vera støði undir hansara avgerð um loyvisveitan.

3. Grannskoðarin skal meta um fíggjarligar upplýsingar um framtíðina, um tað eru nakrar. Grannskoðaraátekningin við sakligum úrslitum skal:

    a) innihalda eina niðurstøðu um, at metingin er gjørd í samsvari við "International Standards for Assurance Engagements (ISAE) 3400" ella viðkomandi føroyskari lóg ella siðvenju, har hesi samsvara við, sum minstamark, treytirnar hjá ISAE 3400; og

    b) latast loyvisveitaranum saman við fíggjarligum upplýsingum um framtíðina, sum skal vera støði undir hansara avgerð um loyvisveitan.

4. Aðrar fíggjarligar upplýsingar enn tær, sum eru nevndar í grein 1 til 3 undir B. omanfyri, kunnu metast av einum grannskoðara. Um so verður gjørt, so skal grannskoðaraátekningin innihalda eina niðurstøðu um, at metingin er gjørd í samsvari við avtalaðum arbeiðsgerðum í samsvari við "International Standard on Related Services (ISRS) 4400" ella viðkomandi føroyskari lóg ella siðvenju, har hesi samsvara við, sum minstamark, treytirnar hjá ISRS 4400. Grannskoðaraátekningin skal latast loyvisveitaranum saman við viðkomandi upplýsingunum, sum skal vera støði undir hansara avgerð um loyvisveitan.

# Fylgiskjal II. Minstukrøv til roknskaparupplýsingar

## A. Meginregla

1. Uttan mun til krøvini í ársroknskaparlógini, so krevja fíggjarligu treytirnar í hesi reglugerð, at loyvisumsøkjarar leggja fram eitt ávíst minstamark av fíggjarligum upplýsingum til loyvisveitaran sum útgreinað í grein 39 og 44.

2. Hvør partur av ársroknskapinum skal lýsast nágreiniliga. Tær fylgjandi upplýsingarnar skulu síggjast væl og endurtakast, har tað er neyðugt inni í ársroknskapinum fyri at tryggja fatanina av upplýsingunum, sum verða lagdar fram:

   a) navn (og løgfrøðiligan bygnað), bústað og virkisbústað hjá roknskaparligu eindini/eindunum og møguligar broytingar í hesum upplýsingum síðani undanfarandi endadag;

   b) um fíggjarligu upplýsingarnar fevna um tann einstaka loyvisumsøkjaran ella eitt samtak av eindum ella okkurt slag av sameining av eindum, og eina lýsing av bygnaðinum og samansetingini av slíkum samtaki ella sameining; og

   c) kravda endadagin og tíðarskeiðið, sum er fevnt av teimum fíggjarligu upplýsingunum (fyri bæði verandi og samanberiligu upplýsingarnar).

## B. Fíggjarstøða

1. Minstukrøvini til upplýsingar í fíggjarstøðuni standa niðanfyri.

   <u>Ogn</u>

   i. tøkur peningur
   ii. áogn frá leikaraflyting
   iii. áogn hjá samtakseindum og øðrum nærstandandi pørtum

   <u>Skuld</u>

   iv. skuld til lánistovnar
   v. skuld til samtakseindir og nærstandandi partar
   vi. skuld frá leikaraflyting
   vii. skuld til starvsfólk
   viii. skuld til sosialar- og skattamyndugleikar

   <u>Eginpeningur</u>

   ix. fluttur vinningur

2. Leiðslan kann meta um, hvørt punktini frá (i) til (ix) eru best lýst í fíggjarstøðuni ella í notunum.

**C. Rakstur**

1. Minstukrøvini til upplýsingar í rakstrinum standa niðanfyri.

   Inntøkur

   i. atgongumerki
   ii. stuðulsavtalur og lýsingar
   iii. handil (søla, tiltøk vm.)
   iv. UEFA solidaritetur og vinningur frá kappingum

   Útreiðslur

   v. sølukostnaður/vørunýtsla
   vi. starvsfólkakostnaður til leikarar
   vii. starvsfólkakostnaður til onnur starvsfólk

2. Leiðslan kann meta um, hvørt punktini frá (i) til (vii) eru best lýst í fíggjarstøðuni ella í notunum.

**D. Notur til ársroknskapin**

1. Notur til ársroknskapin skulu setast upp á skipaðan hátt. Hvørt punkt í fíggjarstøðuni og rakstrinum skulu krossávísast við skyldar upplýsingar í notunum. Minstukrøvini til upplýsingar í notunum standa niðanfyri.

   *a) Nýttur roknskaparháttur*
   Støði undir tilrættarlegging av ársroknskapinum og ein samandráttur av týðandi nýttum roknskaparhátti.

   *b) Partapeningur og framflutt úrslit*
   Greiðast skal frá partapeningi og framfluttum úrsliti hvør sær.

      i. Framflutt úrslit
      Greiðast skal frá javnanum á framfluttum úrsliti (t.e. samanroknaður vinningur ella tap) í byrjanini á roknskapartíðarskeiðinum og dagfestingini á fíggjarstøðuni, umframt broytingum í roknskapartíðarskeiðinum.

   *c) Transaktiónir við nærstandandi partar*

Hava pengaflytingar verið við nærstandandi partar í tíðarskeiðunum, sum roknskapirnir fevna um, so skal roknskaparliga eindin greiða frá, hvussu sambandið teirra millum er skipað, umframt upplýsa um viðkomandi flytingar og gjaldsjavni, harí skuldbinding, sum eru neyðugar fyri at skilja møguliga ávirkan av sambandinum til fulnar. Greiðast kann frá líknandi punktum samlað, uttan tá ein atskild útgreining er neyðug fyri at skilja ávirkanina, sum flytingar millum nærstandandi partar hevur á ársroknskapin hjá roknskaparligu eindini.

Ein váttan skal gerast, ið váttar, at flytingar millum atknýtt feløg eru gjørdar eftir líknandi mannagongd sum armslongd-flytingar, um slík váttan er sonn.

d) *Treytað skuld*
Um ikki tapsvandin av avgerð er ósannlíkur, so skal roknskaparliga eindin upplýsa um hvønn einstakan bólk av treytaðari skuld á kravda endadegnum, har tað stutt verður greitt frá slagnum av treytaðari skuld, og har tað letur seg gera:

i. einari meting av fíggjarligu ávirkanini;
ii. einari ábending um óvissuna í sambandi við upphæddina ella tíðarásetingina fyri einhvørjari útreiðslu; og
iii. møguleikanum fyri nøkrum slagi av endurgjaldi.

e) *Hendingar eftir roknskaparlok*
Týðandi hendingar eftir roknskaparlok skulu upplýsast (slag av hending og ein meting av fíggjarligu ávirkanini, ella eina frágreiðing um at slík meting ikki kann gerast). Dømi um slíkar hendingar eru:

i. tíðaravmarkað lántøku sum nærkast afturgjaldstíð uttan nakran møguleika at umfíggja ella afturgjalda;
ii. stór rakstrartap;
iii. avdúkingin av týðandi sviki ella feilum, sum vísa, at ársroknskapurin er skeivur;
iv. leiðslan tekur avgerð um at avtaka felagið ella gevast við rakstrinum, ella at tað hevur einki annað val enn at gera so;
v. leikaraflyting, har upphæddin, sum verður latin ella móttikin er týðandi; og
vi. søla ella keyp av ognum – til dømis í sambandi við leikvøllin hjá felagnum.

f) *Aðrar upplýsingar*
Upplýsingar ella frágreiðingar, sum ikki eru við í fíggjarstøðuni ella rakstrinum, men sum eru týdningarmiklar fyri at skilja hesar frágreiðingar og/ella eru neyðugar fyri at lúka fíggjarligu minstukrøvini, skulu upplýsast.

# Fylgiskjal III. Støðið undir ársroknskapinum

## A. Meginregla

1. Ársroknskapurin, sum útgreinaður í grein 39, skal taka støði í roknskaparásetingum, sum eru kravdar eftir føroyskari lóggávu fyri smápartafeløg og galdandi roknskaparrammu í Føroyum – sama hvør løgfrøðiligi bygnaðurin hjá loyvisumsøkjaranum er.

2. Ársroknskapurin skal gerast við teirri fyritreyt, at loyvisumsøkjarin hevur framhaldandi rakstur, sum merkir, at hann væntast at halda fram við sínum virksemi í framtíðini. Tað verður væntað, at loyvisumsøkjarin hvørki ætlar ella noyðist at fara undir avtøku, steðga rakstrinum ella leita sær verju frá kreditorum í samsvari við lóg og reglur.

3. Roknskaparrammurnar, ið eru hóskandi sum grundarlagið undir ársroknskapunum, skulu innihalda ávísar grundleggjandi meginreglur, teirra millum:

   a) rættvísandi framløga;
   b) samanhangandi framløga;
   c) roknskaparlig periodisering;
   d) atskild framløga av hvørjum týðandi bólki; og
   e) eingin mótrokning av ognum og skyldum ella inntøku og útreiðslu.

4. Ársroknskapurin skal góðkennast av leiðsluni og hetta skal prógvast við stuttari váttan og undirskrift frá nevndarlimi/nevndarlimum, sum løgfrøðiliga kunnu binda roknskaparligu eindina hjá loyvisumsøkjaranum.

## B. Treytir fyri konsolidering

1. Fíggjarligu upplýsingarnar hjá øllum eindunum, sum eru við í roknskapargrundarlagnum, mugu antin vera konsoliderað ella samantvinnað sum vóru tey eitt einstakt felag.

2. Konsolideraður ársroknskapur er ársroknskapur hjá einum bólki, har ognir, skuld, eginpeningur, inntøkur og útreiðslur hjá móðurfelagnum og dótturfeløgum eru framløgd sum hjá einum einstakum felag.

3. Samantvinnaður ársroknskapur inniheldur upplýsingar um tvær ella fleiri roknskaparligar eindir, sum hava felags ræði, uttan upplýsingar um tað ráðandi felagið.

## Fylgiskjal IV. Fatan av gjaldkomnari skuld

1. Skuld verður mett at vera gjaldkomin, um hon ikki er goldin sambært avtalaðu treytunum.

2. Skuld verður ikki mett at vera gjaldkomin, innanfyri fatanarkarmarnar av hesi reglugerð, um loyvisumsøkjarin/loyvishavin (t.e. skuldarfelagið) er ført fyri at prógva í seinasta lagi **31. januar**, at:

   a) hann hevur goldið fullu upphæddina; ella

   b) hann hevur gjørt avtalu, sum er góðtikin skrivliga av kreditorinum, at leingja tíðarfreistina fyri gjaldinum út um ásettu tíðarfreistina (gev gætur: hóast kreditorur ikki hevur umbiðið eitt gjald, er hetta ikki at skilja sum ein leinging av tíðarfreistini); ella

   c) hann hevur reist eitt rættarkrav, sum viðkomandi lógarmyndugleiki hevur lovað undir føroyskari lóg ella er í sakarmáli gjøgnum føroyskar ella altjóða fótbóltsmyndugleikar ella viðkomandi gerðarrætt fyri at stríða ímóti kravinum um skuld, sum er fallin til gjaldingar; men metir loyvisnevndin, at sakarmálið bert er reist fyri at sleppa sær undan tíðarfreistini, sum hendan reglugerðin hevur ásett (t.e. fyri at keypa sær tíð), vil viðkomandi upphædd framhaldandi vera at skilja sum gjaldkomin skuld; ella

   d) hann hevur valt at stríðast ímóti einum kravi ella málið, sum er reist ímóti honum viðvíkjandi gjaldkomnari skuld, við at venda sær til viðkomandi lógarmyndugleika í Føroyum, føroysku ella altjóða fótbóltsmyndugleikarnar ella viðkomandi gerðarrætt, og hann er førir fyri at vísa yvirfyri loyvisnevndini, at hann hevur orsøk til at stríða ímóti slíkum kravi ella máli ímóti sær; men metur loyvisnevndin, at slík orsøk til at stríða ímóti kravinum ella málinum sum verandi týðiliga ógrundaður vil viðkomandi upphædd framhaldandi vera at skilja sum gjaldkomin skuld; ella

   e) hann er førur fyri at vísa á við nøktandi grundgeving fyri loyvisnevndini, at hann hevur tikið nøktandi stig at eyðmerkja og gjalda til kreditor felagið, tá tað kemur til venjingarendurgjald og solidaritetsendurgjald (sum lýst í *FIFA Regulations on the Status and Transfer of Players*).

# Fylgiskjal V. Metingarmannagongd loyvisveitarans

### A. Meginregla

Metingarmannagongdirnar til eftirkanning av, at fíggjarliga treytin nevnd í grein 8 verður hildin, fevnir um ávísar metingar, ið skulu fylgjast af loyvisveitaranum. Metingarnar standa niðanfyri.

### B. Meting av grannskoðaraátekningini og ársroknskapinum

1. Viðvíkjandi ársroknskapinum, so skal loyvisveitarin í minsta lagi fremja hesar metingarmannagongdir:

    a) meta um valda roknskaparliga eindin er skikkað sum loyvisumsøkjari;

    b) meta um upplýsingarnar (ársroknskap, sum eisini kann innihalda eykaupplýsingar), sum eru komnar inn sum støði undir loyvisumsókníni;

    c) lesa og geva ársroknskap og grannskoðaraátekning gætur; og

    d) taka støðu til avleiðingarnar av tillaging av grannskoðaraátekningini (samanborið við vanliga átekning uttan viðmerkingar) og/ella manglar samanborið við minstukrøv til upplýsingar og roknskaparkrøv sambært stykki 2 niðanfyri.

2. Eftir at hava mett um roknskaparligu eindina og lisið grannskoðaraátekningina í ársroknskapinum, skal loyvisveitarin meta um hesi í mun til niðanfyristandandi punkt:

    a) hevur grannskoðaraátekningin eina niðurstøðu uttan fyrivarni og uttan ískoytisupplýsingar, er tað nóg gott grundarlag til at geva loyvi;

    b) hevur grannskoðaraátekningin eina niðurstøðu við fyrivarni orsaka av manglandi prógvum, og/ella har tað ikki er møguligt at koma til ta niðurstøðu, at ársroknskapurin er rættvísandi, skal loyvið noktast, uttan so at ein eftirfylgjandi grannskoðaraátekning uttan áður nevnda fyrivarni verður latin inn (í sambandi við ein annan ársroknskap fyri sama tíðarskeið, og sum lýkur minstukrøvini) og loyvisveitarin er nøgdur við næstu grannskoðaraátekningina;

    c) hevur grannskoðaraátekningin viðvíkjandi framhaldandi rakstri antin ískoytisupplýsingar ella fyrivarni (qualified ‘except for’ opinion), skal loyvið noktast, uttan antin:

        i. onnur grannskoðaraátekning uttan ískoytisupplýsingar ella fyrivarni um framhaldandi rakstur er latin inn fyri sama fíggjarár; ella
        ii. nýggj skjalprógv, sum vísa førleikan hjá loyvisumsøkjaranum til at halda fram við rakstrinum, í minsta lagi til endan á loyvisárinum, til nøgdsemi hjá

loyvisveitaranum. Nýggju skjalprógvini hava, men eru ikki avmarkað til upplýsingarnar, sum eru lýstar í grein 37 (fíggjarligar upplýsingar um framtíðina); og

d) hevur grannskoðaraátekningin, í sambandi við onnur viðurskifti enn framhaldandi rakstur, antin ískoytisupplýsingar ella fyrivarni, so skal loyvisveitarin umhugsa avleiðingarnar av broyttu átekningini, hvat loyvi hjá felagum viðvíkur. Loyvið kann vera noktað, uttan so at nýggj skjalprógv koma fram, og verða mett so at loyvisveitarin er nøgdur. Nýggju skjalprógvini, sum kunnu vera umbiðin av loyvisveitaranum, verða treytað av orsøkini fyri tillagingini í grannskoðaraátekningini.

3. Um loyvisumsøkjarin letur inn eykaupplýsingar, so skal loyvisveitarin harumframt meta um niðurstøðuna í váttanini fyri avtalaðar arbeiðsgerðir viðvíkjandi eykaupplýsingum. Loyvið kann noktast um viðmerkingar eru um feilir og/ella staðfest frávik.

## C. Meting av gjaldkomnari skuld til onnur fótbóltsfeløg, starvsfólk ella sosialar- og skattamyndugleikar

1. Viðvíkjandi gjøldum, sum eru fallin til gjaldingar til onnur fótbóltsfeløg, starvsfólk og sosialar- og skattamyndugleikar, so kann loyvisveitarin velja at:

   a) meta sjálvur um upplýsingarnar, sum loyvisumsøkjarin hevur latið inn, í hesum føri skal hann gera metingina í samsvari við stykki 2, 3 ella 4 niðanfyri; ella

   b) fáa óheftar grannskoðarar at gera metingarnar, og so má hann gjøgnumganga niðurstøðurnar hjá grannskoðaranum og, serliga, vátta, at útvaldu stakroyndirnar eru nøktandi, og hann kann gera aðrar metingar, sum hann heldur vera neyðugar, t.e. víðka talið á stakroyndum og/ella biðja um fleiri skjalprógv frá loyvisumsøkjaranum.

2. Viðvíkjandi gjaldkomnari skuld til onnur fótbóltsfeløg, um metingin er gjørd av loyvisveitaranum, so skal hann meta um upplýsingarnar, sum loyvisumsøkjarin hevur latið inn, serliga yvirlitið yvir leikaraflytingar og tilhoyrandi stuðlandi skjøl, sum útgreinað niðanfyri. Verður metingin gjørd av einum grannskoðara, so mugu líknandi stig takast av grannskoðaranum:

   a) Stemma av endaligu samanteljingina í yvirlitinum yvir leikaraflytingar við upphæddina í 'skuld frá leikaraflytingum' í ársroknskapinum tann 31. desember.

   b) Eftirkanna støddfrøðiliga neyvleikan í yvirlitinum yvir leikaraflytingar.

   c) Velja allar ella eitt úrval av leikaraflytingum/-lánum, samanbera samsvarandi avtalurnar við upplýsingarnar, sum eru í yvirlitinum yvir leikaraflytingar og undirstrika valdu flytingarnar/lánini.

   d) Velja øll ella eitt úrval av gjøldum fyri leikaraflytingar, samanbera við upplýsingarnar, sum eru í yvirlitinum yvir leikaraflytingar og undirstrika valdu gjaldingarnar.

e) Um eitt gjald, sum er fallið til gjaldingar 31. januar, sum viðvíkir eini flyting, sum fór fram fyri 31. desember árið fyri, kanna so í seinasta lagi 31. januar at:

   i. ein avtala er komin í lag í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(b)**; ella
   ii. ein ósemja/krav er íkomin í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(c)** ella er reist í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(d)**; ella
   iii. øll rímilig stig eru tikin í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(e)**.

f) Kanna øll ella eitt úrval av kontuyvirlitunum, ið vísa gjaldingar.

g) Um neyðugt, kanna skjøl, harí avtalur við viðkomandi fótbóltsfelag/feløg og/ella brævasamskifti við rættu eindina, ið stuðla e(i), e(ii) og/ella e(iii) omanfyri.

3. Viðvíkjandi gjaldkomnari skuld til starvsfólk, um metingin er gjørd av loyvisveitaranum, so skal hann meta um upplýsingarnar, sum loyvisumsøkjarin hevur latið inn, serliga yvirlitið yvir starvsfólk og tilhoyrandi stuðlandi skjøl, sum útgreinað niðanfyri. Verður metingin gjørd av einum grannskoðara, so mugu líknandi stig takast av grannskoðaranum:

a) Fáa til vega yvirlitið yvir starvsfólk, sum leiðslan hevur gjørt.
b) Stemma endaligu samanteljingina í yvirlitinum yvir skuld til starvsfólk av við upphæddina í 'skuld til starvsfólk' í ársroknskapinum tann 31. desember.
c) Fáa til vega og kanna øll ella tilvildarliga vald váttanarbrøv hjá starvsfólkum og samanbera upplýsingarnar við tær, sum eru í listanum yvir starvsfólk.
d) Um eitt gjald, sum er fallið til gjaldingar 31. januar, sum stavar frá sáttmála ella lógarásettum bindingum fram til 31. desember í undanfarna ári, kanna so í seinasta lagi 31. januar at:

   i. ein avtala er komin í lag í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(b)**; ella
   ii. ein ósemja/krav er íkomin í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(c)** ella er reist í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(d)**.

e) Eftirkanna at samsvar er millum leikara- /starvssáttmálar og útgoldnar lønir sambært TAKS í farna árinum hjá øllum ella einum úrvali av starvsfólkum á yvirlitinum yvir gjaldkomna skuld til starvsfólk.
f) Um neyðugt, kanna skjøl, harí avtalur við viðkomandi starvsfólk og/ella brævasamskifti við rættu eindina, ið stuðla d(i) og/ella d(ii) omanfyri.

4. Viðvíkjandi gjaldkomnari skuld til sosialar- og skattamyndugleikar, um metingin er gjørd av loyvisveitaranum, so skal hann meta um upplýsingarnar, sum loyvisumsøkjarin hevur latið inn, serliga yvirlitið yvir sosialar- og skattamyndugleikar og tilhoyrandi stuðlandi skjøl, sum útgreinað niðanfyri. Verður metingin gjørd av einum grannskoðara, so mugu líknandi stig takast av grannskoðaranum.

a) Fáa til vega yvirlitið yvir sosialar- og skattamyndugleikar, sum leiðslan hevur gjørt.
b) Stemma endaligu samanteljingina í yvirlitinum yvir sosialar- og skattamyndugleikar av við upphæddina í 'skuld til sosialar- og skattamyndugleikar' í ársroknskapinum tann

31. desember.

c) Fáa til vega tilsvarandi stuðlandi skjøl.

d) Um eitt gjald, sum er fallið til gjaldingar 31. januar, sum snýr seg um gjald til sosialar- og skattamyndugleikar, sum stavar frá sáttmála ella lógarásettum bindingum við starvsfólk, sum fór fram fyri 31. desember í undanfarna ári, kanna so í seinasta lagi innan 31. januar at:

   i) ein avtala er komin í lag í samsvari við **fylgiskjal VII(2 b)**; ella
   ii) ein ósemja/krav er íkomin í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(c)** ella er reist í samsvari við **fylgiskjal IV(2)(d)**;

e) Kanna allar ella eitt úrval av kontuyvirlitunum, ið vísa gjaldingar.

f) Um neyðugt, kanna skjøl, harí avtalur við viðkomandi sosialar- og skattamyndugleikar og/ella brævasamskifti við rættu eindina, ið stuðlar undir d(i) og/ella d(ii) omanfyri.

**D. Meting av fíggjarligum upplýsingum um framtíðina**

1. Viðvíkjandi fíggjarligu upplýsingunum um framtíðina, so skal loyvisveitarin meta um, hvørt brot er framt ímóti einum indikatori, sum er útgreinaður í grein 44. Er indikatorurin brotin, so skal óheftur grannskoðari gera metingar um fíggjarligu upplýsingarnar um framtíðina. Loyvisveitarin skal eftirkanna váttanina frá grannskoðaranum og skal tryggja, at óhefti grannskoðarin hevur fylgt metingarmannagongdunum í stykki 2 niðanfyri.

2. Metingarmannagongdin skal í minsta lagi hava fylgjandi:

   a) eina kanning av, um fíggjarligu upplýsingarnar um framtíðina eru roknaðar rætt;

   b) gjøgnum kjak við leiðsluna og eina gjøgnumgongd av fíggjarligu upplýsingunum um framtíðina, at gera av, um fíggjarligu upplýsingarnar um framtíðina eru gjørdar við at nýta tær upplýstu fyritreytirnar og váðarnar;

   c) eina kanning av um byrjunarsaldo, sum er í fíggjarligu upplýsingunum um framtíðina, er í samsvari við fíggjarstøðuna í grannskoðaða ársroknskapinum fyri farna ár; og

   d) eina kanning av um fíggjarligu upplýsingarnar um framtíðina formliga eru samtyktar av nevndarlimi/nevndarlimum, sum løgfrøðiliga kunnu binda loyvisumsøkjaran.

   e) Um neyðugt, kanna tilsvarandi stuðlandi skjøl, íroknað avtalur við sponsorar, peningastovnar, partabrævaútboð, bankatrygdir og fundarfrásagnir hjá nevndini.

3. Loyvisveitarin skal meta um gjaldførið hjá felagnum (t.e. um felagið hevur nóg mikið av tøkum peningi, tá hædd verður tikið fyri fíggjarligu skyldunum) og førleikan hjá felagnum fyri framhaldandi rakstri í minsta lagi til endan á loyvisárinum. Loyvið skal noktast um, við støði í fíggjarligu upplýsingunum, sum loyvisveitarin hevur mett um, loyvisveitarin hevur mett, í hansara fatan, at loyvisumsøkjarin ikki er førur fyri at svara sínum fíggjarligu

skyldum so hvørt sum tær fella til gjaldingar og hava framhaldandi rakstur til í minsta lagi endan á loyvisárinum.

## Fylgiskjal VI. Loyvismannagongd

Hetta fylgiskjal útgreinar loyvismannagongdina í loyvisskipan FSF´s og tær arbeiðsmannagongdir, ið eru galdandi í samband við støðutakan til umsóknir um luttøkuloyvi.

Loyvisnevndirnar skulu arbeiða samsvarandi niðanfyristandandi arbeiðsmannagongdum í samband við støðutakan til luttøkuloyvir og skulu taka hesi atlit:

*a) Tíðarætlan*
Tíðarætlan fyri veitan av luttøkuloyvi til kappingarárið er ásett í **fylgiskjali VII**.

*b) Eins viðferð av loyvisumsøkjarum*
Loyvisumsøkjarar skulu fáa tryggjað síni grundleggjandi rættindi og fáa somu viðferð, og hava rætt til at verða hoyrd, herundir rætt til eina rættvísa hoyring, rætt at fáa innlit í loyvisumsóknarmálið og hava rætt til at fáa eina grundgivna avgerð.

*c) Umboðan*
Loyvisumsøkjarar hava rætt at lata seg umboða (løgfrøðiliga ella á annan hátt).

*d) Rætt at verða hoyrdur*
Við atliti til pkt. c) omanfyri, so hava loyvisumsøkjarar rætt at verða hoyrdir av loyvisnevndunum. Samleikin hjá persónum, ið virka vegna loyvisumsøkjaran, skal verða váttaður, og skulu hesir persónar fáa at vita at teir hava skyldu at tala satt, og skulu fáa boð um, at hesir verða revsaðir av Aga- og etiskunevndini í FSF, um teir føra fram ósannindi ella føra fram falskan ella misvísandi vitnisburð (antin aktivt ella við at bera seg undan at svara).

*e) Kærufreist*
Freistin at kæra eina avgerð hjá Loyvisnevndini um noktilsi av at veita luttøkuloyvi er í seinasta lagi 48 tímar eftir at avgerðin er kunngjørd loyvisumsøkjaranum.

*f) Kæra*
Kæran skal verða skrivlig, og skal innihalda fylgjandi upplýsingar:

- avgerðin sum kært verður um;
- frágreiðing um grundarlagið fyri kæruna;
- nýggj prógv, og
- møguligar aðrar viðmerkingar til málsgongdina.

*g) Formalia í samband við at lata inn kæru*
Kæran skal latast inn skrivliga umvegis teldupost: fsf@fsf.fo (att.: aðalskrivarin) ella borið aðalskrivaranum í Fótbóltssambandi Føroya, Gundadalur, Tórshavn.

*h) Kostnaður fyri at kæra*
Kostnaðurin fyri at kæra er **Kr. 5.000**, ið einans fellur til gjaldingar til Fótbóltssamband Føroya um kærarin ikki fær viðhald í kæruni.

*i) Avleiðingar av kæru*
At kært verður um avgerð hjá Loyvisnevndini hevur ikki við sær útsetandi virknað.

*j) Prógv*
Prógv ella aðrar upplýsingar, ið kærarin ynskir at gera galdandi í kærumálinum skulu verða lýst í kæruskrivinum og skulu møgulig viðkomandi fylgiskjøl leggjast við og latast inn í samsvar við kærufreistina í pkt. (e) omanfyri.

*k) Próvbyrða*
Loyvisumsøkjarin/loyvishavin og kærarin hava próvbyrðuna.

*l) Hoyring / Støðutakan*
Øll prógv, fakta, skjøl, pástandir ella uppáhald skulu leggjast fram áðrenn hoyringina og skulu eisini leggjast fram meðan viðkomandi loyvisnevnd er hjástødd.

Tá ið allir partar hava lagt fram síni sjónarmið, skal viðkomandi loyvisnevnd í útgangsstøðinum taka støðu til kæruna beint eftir hoyringina.

*m) Avgerðir hjá loyvisnevndunum*
Avgerðir hjá loyvisnevndunum skulu vera skrivligar.

Avgerðirnar skulu innihalda:

i. navn á formanni / forkvinnu í viðkomandi loyvisnevnd, og nøvnini á teimum loyvisnevndarlimum, ið hava luttikið í viðgerðini;
ii. navn á loyvisumsøkjara/loyvishava, ið avgerðin snýr seg um;
iii. avgerð sum tikin er;
iv. eina greiða grundgeving fyri noktilsi av at veita luttøkuloyvi;
v. kæruvegleiðing (um hetta er viðkomandi); og
vi. dagfesting, stað og undirskrift hjá viðkomandi nevndarformanni / nevndarforkvinnu.

**Stig í loyvismannagongdini**

***Stig 1:***
Loyvisstjórin fyrireikar og letur loyvisumsøkjarunum umsóknarskjøl, íroknað avrit av hesari loyvisreglugerð.

***Stig 2:***
Loyvisumsøkjarin útfyllir og letur inn umsókn um luttøkuloyvi við neyðugum fylgiskjølum.

***Stig 3:***
Loyvisstjórin eftirkannar at innlatnu umsóknarskjølini eru útfylt og klár at viðgerða. og at hesi eru latin inn innanfyri ásettu tíðarfreistina.

***Avgerð – Tveir møguleikar: stig (A) ella stig 4***

***Stig (A):***
Um loyvisumsøkjarin ikki letur inn umsókn um luttøkuloyvi við neyðugum fylgiskjølum til einstøku loyvistreytirnar innanfyri ásettu tíðarfreistina, tá boðar loyvisstjórin loyvisumsøkjaranum frá hvørji umsóknarskjøl og/ella upplýsingar, ið mangla, og loyvisumsøkjarin verður revsaður við bót áljóðandi **Kr. 20.000**, ið verður at rinda til FSF, um hesar upplýsingar av loyvisstjóranum verða mettar at vera týðandi til tess at ráðgevar hjá loyvisumsitingini kunnu meta um kravd loyviskrøv eru lokin til tess at fáa tillutað luttøkuloyvi.

Loyvisumsøkjarin kann kæra hesar bøtur sum FSF gevur, men tá skal kæra latast Aga- og etiskunevndini í FSF **innanfyri 7 dagar** frá tí at loyvisumsøkjarin fær kunningina frá loyvisstjóranum.

Aga- og etiskanevndin í FSF tekur støðu til kæruna í samsvar við aga- og etiskureglugerð FSF´s.

Loyvismannagongdin heldur fram til stig 4.

***Stig 4:***
Loyvisstjórin skrásetir innkomnu skjølini, og letur viðkomandi skjøl víðari til sínar ráðgevar til eftirkannan.

***Stig 5:***
Ráðgevarnir taka ímóti viðkomandi umsóknarskjølum hjá loyvisumsøkjarunum frá loyvisstjóranum, eftirkanna skjølini, meta um loyvistreytirnar eru loknar, samskifta við loyvisumsøkjaran um ófullfíggjaðar upplýsingar og letur loyvisstjóranum eina frágreiðing um loyvisumsøkjarin lýkur allar loyvistreytirnar ella ikki, við upplýsing um hvørjar upplýsingar mangla ella eru ófullfíggjaðar (um viðkomandi).

***Stig 6:***
Loyvisstjórin metir um frágreiðingarnar, og samskiftir við ráðgevarnar um møgulig ivamál (um viðkomandi).

***Stig 7:***
Loyvisstjórin metir um loyvisumsøkjaran við útgangsstøði í loyvisumsóknini og frágreiðingunum frá sínum ráðgevum, og letur Loyvisnevndini eitt tilmæli saman við frágreiðingunum frá ráðgevunum.

Tilmælið frá loyvisstjóranum skal upplýsa um hvørt loyvisumsøkjarin lýkur ásettu loyvistreytirnar til tess at fáa veitt luttøkuloyvi, og um loyvistreytirnar ikki eru loknar, nærri upplýsing um hvørji skjalprógv sum vanta í loyvisumsóknini.

***Stig 8:***
Loyvisnevndin fær tilmælið frá loyvisstjóranum 7 dagar áðrenn evstamark at taka støðu til luttøkuloyvið, nevndin metir um tilmælið, og um neyðugt, umbiður nærri upplýsingar ella skjøl frá loyvisstjóranum ella loyvisumsøkjaranum, og tekur avgerð um at veita ella nokta luttøkuloyvið. Loyvisnevndin kann umbiðja eina hoyring við loyvisumsøkjaran, serliga í samband við týðandi fíggjarligar umstøður.

***Avgerð – Tveir møguleikar: stig (B) ella stig 9.***

***Stig (B):***
Aftaná gjølla, at hava mett um umsókn loyvisumsøkjarans, tilmæli loyvisstjórans, og teimum upplýsingum sum loyvisumsøkjarin hevur lagt fram í einari møguligari hoyring, tekur Loyvisnevndin avgerð um at nokta at veita luttøkuloyvi. Avgerðin inniheldur eina útgreinaða grundgeving fyri avgerðini við tilvísing til tær loyvistreytir, ið ikki eru loknar, og loyvisumsøkjarin fær møguleika at kæra avgerðina til Kærunevndina í loyvismálum. Loyvismannagongdin heldur áfram til stig (C).

***Stig (C):***
Loyvisumsøkjarin letur inn kæru í samsvar við ásettu mannagongdirnar fyri kærumál.

Kærunevndin í loyvismálum fær fráboðan um at kæra er innkomin og fundardagur í nevndini verður ásettur. Loyvismannagongdin heldur áfram til stig (D).

***Stig (D):***
Loyvisstjórin letur Kærunevndini í loyvismálum eina frágreiðing. Frágreiðingin inniheldur nærri upplýsingar um ivasom viðurskifti og grundgevingarnar fyri at nokta at veita luttøkuloyvi. Loyvismannagongdin heldur áfram til stig (E).

***Stig (E):***
Kærunevndin í loyvismálum kemur saman og metir um kæruna. Loyvismannagongdin heldur áfram til stig (F).

***Stig (F):***
Avgerð hjá Kærunevndini í loyvismálum.

***Avgerð – Tveir møguleikar: stig G ella stig 9***

***Stig (G):***
Aftaná gjølla, at hava mett um umsókn loyvisumsøkjarans, frágreiðing loyvisstjórans, og teimum upplýsingum sum loyvisumsøkjarin hevur lagt fram í einari møguligari hoyring, tekur Kærunevndin í loyvismálum avgerð um at nokta at veita luttøkuloyvi.

***Stig 9:***
Aftaná gjølla, at hava mett um umsókn loyvisumsøkjarans, tilmæli loyvisstjórans, og teimum upplýsingum sum loyvisumsøkjarin hevur lagt fram í einari møguligari hoyring, tekur viðkomandi loyvisnevnd avgerð um at veita luttøkuloyvi. Veitan av luttøkuloyvi er treytað av, at loyvisumsøkjarin lýkur loyvistreytirnar í kapittul 3 í hesari reglugerðini, ið eru kravdar fyri at fáa luttøkuloyvi. Veitta luttøkuloyvið kann innihalda viðmerkingar til loyvisumsøkjaran um framtíðar viðurskifti, sum loyvisumsøkjarin eigur at geva sær far um. Loyvismannagongdin heldur áfram til stig 10.

***Stig 10:***
Loyvisstjórin fær útflýggjað avgerðirnar hjá loyvisnevndunum. Við støði í avgerðunum, letur loyvisstjórin eitt yvirlit til aðalskrivaran í FSF yvir hvørjir loyvisumsøkjarar, ið hava fingið veitt luttøkuloyvi og hvørjir hava fingið noktað luttøkuloyvi.

***Stig 11:***
Aftaná, at loyvisumsøkjarin hevur fingið veitt luttøkuloyvi, og fram til endan av kappingarárinum í loyvisárinum sum luttøkuloyvi er veitt til, hevur loyvishavin skyldu til beinanvegin skrivliga, at fráboða eftirfylgjandi hendingar ella viðurskifti til loyvisveitaran, ið loyvishavin er vitandi um, ið kunnu hava eina neiliga ávirkan á førleikan hjá loyvishavanum at halda fram við framhaldandi rakstri til endan av kappingarárinum, sum luttøkuloyvi er veitt til.

Loyvisveitarin metir leypandi um viðurskiftini í stig 11, so hvørt sum hann verður vitandi um tílík viðurskifti.

# Fylgiskjal VII. Tíðarætlan fyri loyvismannagongd

| | |
|---|---|
| **1. januar 2026** | Umsóknarskjølini send loyvisumsøkjarunum. |
| **1. februar 2026** | **Innlatingarfreist** hjá loyvisumsøkjarum, at lata inn umsókn um luttøkuloyvi til Meistaradeildina, og/ella 1. Deild hjá monnum. |
| **1. - 17. februar 2026** | Tíðarskeið tá loyvisumsóknirnar verða eftirkannaðar av loyvisumsitingini og tíðarfreist hjá ráðgevum at lata loyvisstjóranum eina endaliga frágreiðing um loyvistreytirnar eru loknar. |
| **18. februar 2026** | Loyvisstjórin letur Loyvisnevndini tilmæli. |
| **26. februar 2026** | Evstamark hjá Loyvisnevndini at taka støðu til loyvisumsóknirnar. |
| **8. mars 2026** | Evstamark hjá Kærunevndini í loyvismálum at taka støðu til kærur. |